DAGSINS MEINING

Spennandi tunnilsætlan!

Tað liggur frammarliga í hugaheiminum hjá teimum flestu at koma skjótt og lætt aftur og fram. Allar farleiðir skulu styttast og fólk vilja helst sleppa undan siga, og skal siglast so skal tað vera stytsta leið. Tí hava vit fingið tunnlar millum bygdir, og tí hava vit bygt ferjulegur á støðum, so vit kunnu spara ein hálvan ella ein heilan tíma.

Hetta krevur dagsins samfelag, men góð samferðsluviðurskifti krevjast eisini, um vit skulu hava eitt vælvirkandi samfelag við einum dynamiskum og góðum vinnulívi, og tey krevjast eisini, um fólk skulu trívast, serliga í útjaðaranum, ella í fjarskotnum bygdum.

Føroyska samfelagið hevur tí gjørt stórar íløgur í vegir, tunnlar og havnir. Sumt hevur verið tvingandi neyðugt, meðan summar íløgur kunnu virka í so marglætiskendar. Tó eru øll í dag sannført um, at rætt var at gera undirsjóvartunnilin.

Men mong seta óivað spurnartekin við, um tað er neyðugt at gera Norðoyatunnilin nú, ella um hann kann bíða nøkur ár, áðrenn borað verður undir Lorvíksfjørð. Tað eru jú aðrar neyðugar iløgur, sum hava bíðað í so leingi.

Nú er so knappliga komin undan kavi ein ætlan at gera ein tunnil av Skálafirði til Suðurstreymoy. Ein slíkur tunnil er onkuntíð nevndur, tí talan er um tvey týðandi vakstraraøki, men nú liggur so eitt ítøkiligt uppskot á borðinum í Vinnumálastýrinum, sum ein bólkur við Skálafjørðin hevur gjørt sjálvboðin.

Hetta er sjálvandi ein áhugaverd ætlan, og varð ein costbenefit útrokning gjørd, so hevði hon óivað raðfest ein slíkan tunnlin ovarligari enn aðrar verktætlanir á samferðsluøkinum. Hóast hesin tunnil millum Runavík og Havnina er áhugaverdur of spennandi eiga vit at steðga á og hugsa okkum um eina løtu.

Harafturat eigur Vinnumálastýrið at gera eina heildarætlan fyri samferðsluútbyggingar í Føroyum og raðfesta tær. Tá ein slík ætlan er tøk, eigur at vera eitt veruligt orðaskifti um tær, so vit ikki fara at gera tunnlar og aðrar útbyggingar í óðum verkum.

Samferðslan hevur fingið nógv, m.a. tí vit hava gjørt Vágatunnil og skulu byggja nýggjan Smyril og havnir til hann, so hon má halda aftur í nøkur ár, so vit fáa bygt tey neyðugu ellisheimini og teir neyðugu skúlarnar í árunum, sum koma.

Men ætlanin er áhugaverd og liggur kanska ikki longur enn eini 10-15 ár frammi í tíðini.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eitt handrit

Heri Mohr

Fram í ljósmála er komið eitt handrit til skaldsøgu, sum William Heinesen hevur skrivað í ungum árum, men ongantíð givið út í bók ella á annan hátt almanna kunngjørt. Vit hava fingið at vita, at eigarin av handritinum kundi hugsað sær at givið skaldsøguna út, men til tess krevst loyvi frá arvingunum eftir W. H. Sagt verður, at hesi ikki eru sinnað at játta eitt tílíkt loyvi, tí, siga tey, tað kann ikki vera uttan grund, at W. H. ikki gav hesa skaldsøgu út. Hann hevur kanska ikki verið nøgdur við tað, sum hann hevði skrivað.

SVF hevði eina samrødu mánakvøldið 17. í h.mð. við danan, sum sigur seg eiga handritið.

Í bókini »Tilbageblik på fremtiden«, sum kom út í 1977, er millum nógv annað gott, sum navnframi rithøvundurin og kritikarin Otto Gelsted (1888-1968) hevur skrivað, ein drúgv og áhugaverd grein »William Heinesen og hans værk«, sum hann skrivaði í »Land og Folk« tann 27. juni 1954.

Lítið brot úr greinini: »Den nyfærøske, på landets eget sprog skrevne litteratur, voksede frem med en nationale bevægelse, og den højtbegavede J. O. H. Djurhuus skabte som den første en ren lyrisk digtning på færøsk af stor værdi.

Også prosaen har færingerne dyrket med stort held. Men allerede i 1936 skrev Jørgen-Franz Jacobsen om udviklingen i det færøske kulturliv. »Tendensen er klar nok. Det går bort fra landbruget – henimod fiskeriet. I de nationales lidt enside dyrkelse af den gamle bondekultur synes der at ligge en underkendelse af dette faktum. Den nationale bevægelse har sikkert interesseret sig for lidt for samfundet. Det ville utvivlsomt være heldbringende, om man forlod den gamle lyriske og meget stemningsbevægede kurs og søgte en mere social indstilling. Den nationale sag er jo i sin inderste grund et socialt spørgsmål«.

Disse kloge ord kan anvendes uden omskrivning på William Heinesen. I sin første digtsamling. Artiske Elegier fra 1921, viser han sig som en på samme gang individualistisk og kosmisk lyriker. Han har selv betegnet sit daværende jeg som »asketisk skønhedsdyrker«. I 1924 forsøgte han sig med en religiøs, efter hans eget sigende dødbagt kæmperoman (….)«.

Eftir hesum hevur William Heinesen longu 24 ára gamal – 10 ár áðrenn hansara fyrsta skaldsøga »Blæsende Gry« kom út – skrivað eina skaldsøgu, og tað er tessvegna nærliggjandi at stpyrja, um handritið, sum nú er komið fyri ein dag, er identisk við tað, sum W. H. í 1924 gav prædikatið »dagbagt kæmperoman«?

Rás Tórshavn fyri býráðið

Jógvan Arge, býráðslimur fyri Tjóðveldisflokkin

Nógv havnarfólk taka undir við ætlanini at fáa Rás Tórshavn at senda aftur.

Tað ljóðar, at tað gekk við miklari ferð at fáa undirskriftir á pappírini, sum í vikuni lógu frammi í nøkrum handlum í býnum.

Úrslitið fæst at vita, tá undirskriftirnar verða handaðar Tórshavnar Býráð í kvøld. Samstundis fer býráðið at viðgera uppskotið um at endurstovna kommunalu tænastuna, sum varð røkt við Rás Tórshavn.

Endurvarpingarstøðin varð sløkt fyrst í december, eftir at býráðið við sáttmála seldi Føroya Tele útgerðina hjá støðini.

Síðani hava nógv fólk kent seg sum tveitt fyri hund og ravn av sínum egna býarstýri.

Vilja tey hava meir enn Svf, mugu tey antin taka av tí dýra tilboðnum hjá Televarpinum, fáa sær parabol sjálvi ella royna at sleppa upp í okkurt býlingafelag, sum hevur felags endurvarping til sínar limir (vanliga bíligari enn hini tilboðini).

Undirtøkan, sum innsavningin av undirskriftum hevur fingið, er greitt dømi um, at tað er fallið havnarfólki fyri bróstið, at býráðið hevur slept teimum upp á fjall í sjónvarpsmálinum.

Við Rás Tórshavn høvdu tey møguleika at fáa einar seks útlendskar rásir, sum fevndu um eitt breitt útboð av fylgisveinasendingum fyri allar aldursflokkar og var eitt fram úrískoyti til Sjónvarp Føroya.

Her vóru tilboð av ymsum slag frá tónleiki, ítrótti, tíðindum til filmir og aðrar sendingar á skandinaviskum og enskum máli allan dagin.

Nú sita tey eftir við tí avmakaða tilboð, sum Sjónvarp Føroya kann geva teimum ein lítlan part av degnum.

Vilja tey hava eitt tilboð, sum bara líkist Rás Tórshavn, noyðast tey nú at fara djúpt í lumman. Upp í einar 8000 krónur kostar fyrsta árið hjá kommununnar samstarvsfelaga Televarpinum, og tá er tað bert til eitt sjónvarp.

Mær tykir, at Tórshavnar Kommuna hevur gjørt ein vánaligan handil fyri sínar borgarar.

Raksturin av Rás Tórshavn kostaði umleið eina millión krónur um árið.

Skulu øll húski hennara taka av tilboðnum hjá Televarpinum, verður samlaða meirútreiðslan hjá borgarunum fleiri tíggjutals millión krónur bara fyrsta árið.

Kúvendingin frá politikkinum ikki at vilja hava parabolar á hvørjum húsi, hevur eisini fært fólk út í valið at fáa sær parabol. Tað sæst longu aftur kring allan býin.

Tí er uppskot lagt fyri býráðið um, at Rás Tórshavn fer at senda aftur, og at kommunan eins og higartil rindar tað, sum hendan frálíka kommunala tænastan kostar.

Spurningurin er so, hvør við verður í okkara parti.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjáplass má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Fyrsti fundur um yvirtøkur

Føroyskt og donsk embætisfólk hava hildið fyrsta fundin um nýggja yvirtøkuleistin

YVIRTØKUR
Heri á Rógvi

Føroysk embætisfólk vóru fyrr í vikuni í Danmark og fundaðust við dansk embætisfólk um nýggja yvirtøkuleistin hjá landsstýrinum.

Føroyski leiðari fyri sendinevndina var løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttir.

– Vit eru ígongd við eina prosess. Hetta var fyrsti fundurin í sambandi við yvirtøkulógini á embætismannastigi, sigur Marjun Hanusardóttir.

Løgmansstjórin letur væl at fundinum. Fólkini hinumegin borðið vóru til at snakka við, og vónirnar eru góðar fyri framtíðina.

– Vit diskuteraðu allan problematikkin, og vit kunnu bara vera nøgd, sigur Marjun Hanusardóttir.

Fyribils er eingin nýggjur fundur er ásettur, men tað verður væntandi ikki leingi.

– Vit hava sett ígongd eina prosess, og nú ætla vit okkum at halda á til alt er liðugt, sigur Marjun Hanusardóttir.

Marjun Hanusardóttir var í vikuni á fundi við dansk embætisfólk um nýggja yvirtøkuleistin hjá landsstýrinum

Minningarorð um Sigurð J. Jónsson

f. 7. aug. 1924 – d. 2. november 2002

Vit steðga á. Hesu ferð sera undrandi, tí úr skaranum her á fold, vóru boð eftir einum, ið neyvan nakar hevði roknað við, skuldi fara so skjótt og so óvart.

Sigurð var føddur og uppvaksin í Froðba. Giftist við Jovinu, fødd á Argjaboða, og settu tey búgv á Argjum í 1958.

Fyri okkum, ið komin eru í heimið hjá Sigurði og Jovinu frá barnið av, er hesin tómleiki sera ringur at fata. At Sigurð ikki er har, ið hann plagdi at sita, er okkum óskiljandi.

Sigurð var lítillátin og gjørdi ikki nógv hóvasták burturúr sær sjálvum. Tó fylti hann so ótrúliga nógv sið sínum sera lætta lyndi. Hvør á Argjum kendi ikki Sigurð, sum á Argjum av sonnum var bygdarmynd burturav?

Altíð smílandi og fryntligur, og altíð tilreiðar við einari hjálpandi hond.

Vit, sum vóru javnaldrar við Sigurdjón, vóru í barna- og ungdómsárum, altíð inni hjá Sigurði og Jovinu. Tað var mest sum natúrligt, at soleiðis var tað bara. Orsøkin var tann einfalda, at bæði Sigurð og Jovina dugdu so ótrúliga væl við okkum, sum tá vóru unglingar.

Tá var onki sjónvarp, men »Barba« og »Sjavs« vóru spæld so at siga hvørt kvøld. Sigurð gekk høgt uppí sjavsin, og »fusurun« var ofta havdur á lofti. Tá var ofta flent, tí tá Sigurð gjørdist spentur, ja so var alt á reinum froðbiarmáli.

Av tí at Sigurð og Jovina vóru uppi í teim fyrstu, ið fingu sjónvarp, ja so samlaðist enn meira ungdómur inni á Argjavegi 51. Summar tíðir var hvør stólur upptikin, og restin lá framm eftir rommum á gólvinum. Ongantíð fall eitt øvugt orð frá Sigurði, sjálvt um gangurin kundi vera í so nógvur. Gomlu beinraknu orðini, at har hjartarúm er, er eisini húsarúm, kunnu eina best lýsa, hvussu hansara lyndi var.

Tað er ongin loyna, at boksing og fótbóltur høvdu hansara áhugamál. Hvør minnist ikki Ayub Kalule og Sigurð, sum boksaði hvør sín kamp – Kalule í sjónvarpinum og Sigurð frammanfyri sjónvarpið. Tá haldi eg, at vit ungdómar hugdu meira eftir Sigurði enn Kalule.

Tá ið so tíðin var komin til at fara niður til hægri lesnað, ja so var ein javnan í telefonini við Sigurdjón og »tey gomlu«. Heimið á Argjavegi 51 var altíð har, og tú føldi teg altíð



heima – um tað so var á heimavølli ella í útlandinum. Kenslan av nærveru og umsorgan var altíð tilstaðar.

Til jarðarferðina var tí sera hugaligt at síggja teir mongu javnaldrarnar hjá Sigurdjóni fylgja Sigurði til gravar. Vit allir hava okkara serstøku minnir, sum vit ein slíkan dag leita framaftur – hvør í sínum lagi. Hetta var so okkara seinasti møguleiki at siga Sigurði takk fyri alt hann gav okkum, og tað var nógv.

Sum familjumann minnast vit Sigurð sum eina samlandi eind, har dyrnar ongantíð vóru afturlatnar. Minnist altíð aftur á ríkar løtur, har familja hjá bæði Sigurði og Jovinu vóru samlaði – bæði frá tí heimliga umhvørvinum og so Danmørkini og Íslandi við.

Sigurður hevði íslendskar røtur við tað, at faðir hans var íslendingur. Hetta hevur altíð sett sín serstaka dám í heiminum á Argjavegi 51. Málningur av Tingvellum og so tað íslendsksa flaggið, sum saman við Merkinum, altíð hava prýtt stovuna, tað eg kann minnast. Sigurð var av fullum hjartað norðbúgvi.

Sigurð var eisini í hugburði frælsislyntur norðbúgvi. Hann hevði eina frælsiskenda vón um at Føroyar skuldi vera eitt tjóðveldi, har føroyingar skuldu ráða. Hann hoyrdi við til tað ættarliðið av frælsislyntum føroyingum, sum vildi byggja land eftir leistinum hjá Erlendi Patursyni og Hanusi við Høgadalsá, har verka- og fiskimaðurin vóru tann berandi eindin undir tjóðveldinum.

Trúgvi ikki, at Sigurð nakrantíð skilti nýmótans akademiska tjóðveldismannin.

Barnavinur var hann sum fáur. Tá ið abbabørnini úr Skálavík vóru á vitjan, var ofta hugaligt at síggja, hvussu tolin og hugagóður hann kundi spæla við tey.

So tá abbabørnini úr Skálavík vóru blivin meira vaksin, ja tá kom lítli Hannis. Hannis og abbin vóru eitt. Orð eru ov fátøk til at lýsa kærleikan millum teir báðar.

Seinast eg var inni á gólvinum hjá Sigurð, var sama dagin Argja skúli hevði 50 ára føðingardagsveitslu. Tá var hann heilt væl fyri í allar mátar, og sum vanligt spældi hann við Hannis.

Tá ið Sigurdjón og undirritaði fóru við Hannis ímillum okkum út í skúlan, stóð Sigurð í vindeyganum og eygleiddi okkum út eftir vegnum og oman í skúlan. Hevði onga hóming av, at hetta skuldi vera seinastu ferð, eg skuldi hitta hann í heiminum á Argjavegi 51.

Sigurð var sera góður við kirkjuna. Saman við Jovinu, var Sigurð trúgvur kirkjugangari. Virðingin fyri Hinum Alvalda, var sum hjá teim gomlu føroyingunum. Tað var trúgvin á Hin Alvalda, sum ein altíð hevði við sær, um ein bað sítt Faðir Vár.

Í kirkjuni, tá ið Sigurð stóð undir børu, prædikaði Bergur um tjaldbúðirnar her á fold og so í Himmalinum. Tjaldbúðina her á jørð, hevði Sigurð ansað væl eftir. Eitt nú tann sera prýðiliga urtagarðin á Argjavegi 51, hava Sigurð og Jovina altíð hildið sera vakran. Tað verður saknur nú summarið nærkast, at Sigurð ikki verður at síggja sitandi í urtagarðinum, tá ið sólin stendur hægst í suðuri.

Men Sigurð er nú í tí himmalsku tjaldbúðini, har Hin Alvaldi hevur boðið Sigurði vælkomnum.

Góða Jovina, Sunrid og Sigurdjón! Tit hava mist ein góðan mann, pápa og ikki minst abba og verfaðir. Deyðin er kaldur, tá ið hann trýnir um dyrnar. Má Hin Alvaldi styrkja tykkum í sorgini.

Æra verið minnið um Sigurð J. Jónsson.

Jóannes

Gott ár hjá Hotel Føroyum

Árið í fjør var eitt gott ár hjá Hotel Føroyum. Gistingarhúsið við Oyggjarvegin í Havn hevur tvífaldað yvirskotið í mun til árið fyri. Í fjør var yvirskotið hjá Hotel Føroyum 5.012.000 krónur í mun til 2.458.000 í 2001. Í 2000 var úrslitið hjá Hotel Føroyum 1.429.000 krónur.

Eginpenginurin hjá hotellinum økist eisini av einum so góðum úrslitið, og er eginpeningurin nú slakar 9,5 milliónir krónur.

Tað er Smyril Line, sum eigur Hotel Føroyar, og nevndarformaður er Tórmóður Djurhuus, advokatur, sum eisini er nevndarformaður í Smyril Line. Stjóri á hotellinum er Johannes Jensen. Hinir nevndarlimirnir eru Klæmint Weihe, Óli Hammer og Jóannes á Vali.

Partapeningurin er 8 milliónir krónur, og á Hotel Føroyum starvast 50 fólk.

el

Farex 1,7 mió kr í yvirskoti

Fiskasølan Farex í Havn hevði 1,735 mió krónur í yvirskoti í fjør. Hetta er væl frægari úrslit, enn árini frammanundan. Í 2001 hevði fiskasølan 314.000 krónur í yvirskoti og í 2000 hevði felagið hálvatriðu millión í halli.

Farex hevur flutt alt úrslitið til eginpening, sum nú er 2,775 mió krónur.

Stjóri í Farex er Rói Egholm. Nevndarformaður er Kaj Leo Johannesen. Hinir nevndarlimirnir eru Poul Michelsen og Kári Danielsen.

Partepeningurin í Farex er 600.000 krónur, og har starvast seks fólk.

el